## Kjøt strandað í Keypmannahavn

Fíggjarkreppan í Íslandi rakar nú eisini teir grønlendsku bøndurnar, sum hava reinsdjór. Grønlendsku bøndurnir plaga at útflyta reinsdjórakjøt til Kanada, Svøríkis og til Íslands, men orsakað av fíggjarkreppuni eru 17 tons av grønlendskum reinsdjórakjøti, sum skuldi til Íslands, nú strandað í Keypmannahavn, sigur KNR. Úrslitið er, at teir grønlendsku reinsdjórabøndurnir hava ikki fingið nakrar pengar fyri kjøtið, og tað er ógreitt, hvat hendir við kjøtinum.



# Lívsstílstevna í Havn

**Fyri aðru ferð var lívsstílstevna hildin í Høllini á Hálsi í Havn seinasta vikuskifti við eini rættiliga fjølbroyttari og spennandi skrá. Tað var so heldur eingin minni enn landsstýrismaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm, sum settti stevnuna, ið umframt at seta fokus á vørur og tænastur innan lívsstíl eisini fevndi um heilsu.**









Tað er fyritøkan Synergi, sum stílar fyri hesum afturvendandi tiltakinum, ið dregur fólk úr øllum landinum til høvuðsstaðin hesar báðar dagarnar fyri at kunna vitja teir gott og væl hálvthundrað fjølbroyttu básarnar og annars vera við til tey mongu tiltøkini, sum verða fyriskipað á tí stóra pallinum í sambandi við stevnuna so sum mótashow, Føroya Bjór show, McGavin hárshow, dansishow og hundashow.

"Eitt satt mekka av lekkrum vørum og tænastum til bæði kvinnur, menn og børn" skriva fyrireikararnir í innbjóðingini til stevnuna, sum varð sett leygarmorgunin og helt fram allan sunnudagin. Henda øðrvísi handils- og sølustevnan vendi sær eisini til fólk, sum vildu kanna heilsuna, og her gekk m.a. Klaksvíkar kommuna undan við at kanna lunguni hjá gestunum og Apotekið við at kanna húðina. Eisini kundi tú